ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

**Løgtingið**

27. september 2018
Mál: 18/00829-8
Viðgjørt: HP

**Løgtingsmál nr. 44/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í lov for Færøerne om offentlig forsorg (Forsorgarlógin)** (Javning av uppihaldsveiting)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í lov for Færøerne om offentlig forsorg (Forsorgarlógin)**
(Javning av uppihaldsveiting)

**§ 1**

Í lov nr. 56 af 15. marts 1967 for Færøerne om offentlig forsorg, sbr. lovbekendtgørelse nr. 100 frá 2. marts 1988 om offentlig forsorg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 53 frá 4. mai 2017, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 9, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Stuðul til uppihald sambært stk. 1 verður veittur sambært fylgjandi ásetingum:
1) Persónur, ið býr einsamallur og hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, fær 16.079 kr. um mánaðin.
2) Persónur, ið er sambúgvandi og hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, fær 12.506 kr. um mánaðin.
3) Persónur 25 ár og eldri, ið býr einsamallur og ikki hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, fær 13.400 kr. mánaðin.
4) Persónur 25 ár og eldri, ið er sambúgvandi og ikki hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, fær 8.933 kr. um mánaðin.
5) Persónur yngri enn 25 ár, ið ikki býr hjá einum ella báðum foreldrum og ikki hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, fær 7.146 kr. um mánaðin.
6) Persónur yngri enn 25 ár, ið býr hjá einum ella báðum foreldrum og ikki hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, fær 3.931 kr. um mánaðin."

**2.** Í § 9, stk. 3 verður 1. pkt. strikað.

**3.** § 9, stk. 7 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 7.* Hjá persóni sbrt. stk. 2, nr. 2 verður inntøka hjá møguligum hjúnafelaga mótroknað við 50% av inntøkuni, sum er hægri enn 12.506 kr. Hjá persóni sbrt. stk. 2, nr. 4 verður inntøka hjá møguligum hjúnafelaga mótroknað við 30% av inntøkuni, sum er hægri enn 8.933 kr. Hjá persóni sbrt. stk. 2, nr. 5 verður inntøka hjá møguligum hjúnafelaga mótroknað við 30% av inntøkuni, sum er hægri enn 7.146 kr."

**4.** Í § 9 verður sum stk. 8 sett:
"*Stk. 8.* Upphæddir sambært stk. 2 og 7 og § 13, stk. 1 og 4 verða javnaðar

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

sambært løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum.”

**5.** Í § 13, stk. 1 verður “samsvarandi við 60% av dagpeningaupphæddini” broytt til: “á 10.720 kr.”

**6.** Í § 13, stk. 4 verður “60% av dagpeningaupphæddini” broytt til: “10.720 kr.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2019.

# Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

## 1.1. Orsakir til uppskotið

Sum ein liður í ætlanini hjá samgonguni at tálma útreiðsluvøksturin í sambandi við fíggjarlógina 2019 er ætlanin at broyta javningina av uppihaldsveitingum sambært forsorgarlógini soleiðis, at uppihaldsveitingar verða javnaðar sambært løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum.

## 1.2. Galdandi lóggáva

Aðalmálið við forsorgarveiting er at bøta um fíggjarligu viðurskiftini hjá borgarum, ið eru fyri almannahending, og sum í einum fyribils tíðarskeiði ikki megna at uppihalda sær og sínum. Uppihaldsveiting sbrt. forsorgarlógini kallast forsorgarhjálp.

Persónur, sum fær rætt til forsorgarhjálp, fær eina upphædd, sum er treytað av uppihaldsskyldu mótvegis barni, aldri og bústøðu. Upphæddin er ásett sum ein prosentpartur av hægstu dagpeningaupphædd. Veitingarnar pr. mánað sambært forsorgarlógini galdandi frá 1. mai 2018 eru hesar:

| | **Í % av dagp. upph.** | **Upphædd pr. mánað** |
|---|---|---|
| *Uppihaldsskyldu mótvegis børnum - búgva einsamøll* | 90 % | 16.079 |
| *Uppihaldsskyldu mótvegis børnum – sambúgvandi* | 70 % | 12.506 |
| *25 ár og eldri, uttan børn - búgva einsamøll* | 75 % | 13.400 |
| *25 ár og eldri, uttan børn – sambúgvandi* | 50 % | 8.933 |
| *Yngri enn 25 ár, uttan børn - býr ikki hjá foreldrum* | 40 % | 7.146 |
| *Yngri enn 25 ár, uttan børn - býr hjá foreldrum* | 22 % | 3.931 |
| *Varandi veiting** | 60 % | 10.720 |

*Viðm.: Forsorgarveiting er skattskyldug. Tey, sum fáa varandi veiting hava rætt til ein frádrátt í skattinum, sum er 10.500 kr. um árið til gift og 16.200 kr. til ikki-gift.*

At forsorgarhjálpin er ásett sum ein prosentpartur av dagpeningaupphæddini merkir, at veitingin ikki verður javnað eins og aðrar almannaveitingar, men hon fylgir lønarlagnum á arbeiðsmarknaðinum. Hægsta dagpeningaupphædd er ásett sum 80 % av løn sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag. Tað skal nevnast, at veitingar eftir løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk eru ásettar eftir sama hátti sum forsorgarhjálpin.

Flestu aðrar almannaveitingar verða javnaðar sambært *løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum*. Meðan forsorgarhjálpin er javnað á hvørjum ári, eru aðrar almannaveitingar seinnu árini nærum ikki javnaðar. At veitingarnar verða javnaðar á ymiskan hátt kann við tíðini hava við sær, at samanhangurin millum ymsu almannaveitingarnar skeiklast. Fyri at samanhangur skal vera millum ymsu almannaveitingarnar, verður skotið upp, at hesar frameftir verða javnaðar eftir somu lóg.

**Hækking av forsorgarhjálpini og øðrum almannaveitingum í prosentum árini 2014-2018**

| | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** |
|---|---|---|---|---|---|
| *Forsorgarhjálp* | 1,90 | 2,21 | 2,20 | 2,11 | 2,59 |
| *Aðrar almannaveitingar* | 0,85 | 0,00 | 0,00 | 0,00 | 0,00 |

Tað skal tó nevnast, at viðvíkjandi fleiri av veitingunum, sum verða javnaðar sambært løgtingslóg um áseting og javning, og sum ikki eru stórvegis javnaðar í fleiri ár, hevur Løgtingið á ymsan annan hátt bøtt um fíggjarligu korini hjá teimum, sum fáa hesar veitingar.

Løgtingið hevur við løgtingsmáli nr. 71/2017 samtykt lógina um javningarprosent til almannaveitingar, sum kemur í gildi í 2020. Veitingar, sum í dag verða javnaðar sambært løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum, fara tá at verða javnaðar eftir nýggju lógini, og tá fer javningin sostatt at leggjast í fastar karmar.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at lækka útreiðslur landskassans og at samskipa javningina av almannaveitingum.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Í galdandi lóg er forsorgarhjálpin ásett sum ein prosentpartur av hægstu dagpeningaveiting (sbrt. løgtingslóg um dagpening vegna sjúku) og tað merkir, at forsorgarhjálpin fylgir lønarlagnum á privata arbeiðsmarknaðinum. Sambært hesum uppskoti verður forsorgarhjálpin ásett sum ein føst upphædd, sum verður javnað sambært løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum.

Forsorgarhjálpin verður í lógini ásett til somu upphæddir, sum eru galdandi í dag (sí talvu á síðu 2). Broytingin verður, at sambandið til dagpengar verður kvett. Á henda hátt verða uppihaldsveitingar javnaðar eins og aðrar almannaveitingar, og javningin verður galdandi frá 1. januar á hvørjum ári.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið er ikki sent til ummælis, tí talan er um fylgilóg til fíggjarlógina.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur

Sáttmálalønirnar millum arbeiðarafeløgini og Føroya Arbeiðsgevarafelag hækkar við 2,56 prosentum 1. mai 2019. Verður hendan lógarbroytingin ikki framd, hækkar forsorgarhjálpin eisini við 2,56 prosentum. Játtanin í 2019 til forsorgarhjálp og til varandi veiting er uml. 55 mió. kr., og ein hækking av veitingini á 2,56 prosent kostar landskassanum næstan eina mió. kr. Tá er hædd tikin fyri, at javningin fer fram 1. mai í 2019.

Við hesi broytingini verður forsorgarhjálpin ikki javnað í 2019, og landið sparir tí knappliga eina mió. kr.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar av týdningi. At allar almannaveitingar fara at verða javnaðar samstundis og við sama satsi ger skipanina meira gjøgnumskygda.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri eitt ávíst øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Forsorgarveitingar fara frameftir at verða javnaðar sambært løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum og seinni við løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar. Hetta merkir, at javningin væntandi verður eitt sindur lægri enn við verandi skipan.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

**2.9. Marknaforðingar**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær kendar marknaforðingar.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skatt ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið/ landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar /felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1, nr. 1, 2, 3, 5 og 6**
Við áseting av forsorgarveiting verður ikki longur víst til dagpening vegna sjúku. Upphæddin, sum borgari hevur rætt til, er nú sett í lógina.

**Til § 1, nr. 4**
Forsorgarveitingar verða javnaðar sambært løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum.

**Til § 2**
Lógin kemur í gildi 1. januar 2019.

Almannamálaráðið, 27. september 2018

**Eyðgunn Samuelsen**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur